# Hósdagur 8. juni

**UF**

7.00 **Tíðindi**
7.13 **Morgunlestur** - Jenny Lydersen í Havn lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.35 **Góðan Morgun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Jenny Lydersen í Havn lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Tilvera** - Adolf Hitler er gubbi mín (e) - Armgarð Arge leggur til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Tónleikasending** (e)
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.18 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Ljóðkrás** - Sending við popptónleiki. 2. sending hjá James Olsen
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.28 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum**
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Ránið** - 5. partur av framhaldssøgu eftir Mette Newth. Árni Dahl týddi. Páll Danielsen lesur.
21.00 **Tíðindi**
21.07 **Vaglið** - Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
14.30 **Barnalindin**
17.00 **M & M's** - Sending fyri tannáringar
18.00 **Dagsins orð**
18.05 **M & M's** heldur fram
19.00 **Brot og bitar** - Ein viðkomandi tíðindasending v / Britt Rasmussen og Eyvind Bringsberg
20.00 **Barnalindin** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð** (e)
20.55 **Dagsins orð** (e)
21.00 **Bønarlinjan við gesti** - Bønarevni kunnu ringjast inn á tlf. 321377, Fax 321379.

**Rás 2 FM 102**

8.00 **Morguntónleikur -** Lættur blandaður tónleikur
9.45 **Orðið -** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis** - Beinleiðis sending við tónleiki og práti - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Dansitónleikur fyri vaksin**
13.00 **Føroyskur tónleikur**
14.00 **Laila Beinleiðis** - Beinleiðis countrysending
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Lættur tónleikur**
16.00 **KT R@sin** - Kunnandi ungdómssending fyri ung og eldri. - Um kunningartøkni í víðastu merking í samstarvi við Føroya Tele.
17.00 **Barnaløtan** - Oddbjørg og Lissi leggja til rættis
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
19.00 **Hans og Dýrini**
20.00 **Ungdómstónleikur**
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Orðið** (e) **-** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 **GirlZone -** Beinleiðis ungdómssending við gestum. - Anita Ottosen, Ruth Reinert og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telefon: 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@ras2.fo
24.00 **Góða nátt**

**SvF**

18.30 **Øskufía** 22:26
19.00 **Sjimpansur sum royndardjór** - en. dok.
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **Krimitímin: Ruth Rendell - at vera fyrivarin er ein dygd** 1:6
21.40 **Soleiðis eru kvinnur** 1:6 - Kroppur
22.20 **Ferðafrásøgn: San Francisco**
23.05 **Whoopi Goldberg**
23.30 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Football**
8.30 **Golf**
9.30 **Cart**
10.30 **Football**
11.30 **Canoeing**
12.30 **Superbike**
13.00 Live - **Tennis**
18.30 **Olympic Games**
19.00 **Motorsports**
20.00 **Football**
21.00 **Football**
22.00 **Tennis**
23.00 **Motorsports**
0.00 **Football**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
9.00 **Den sorte hingst**
9.25 **Hvide Løgne**
9.55 **Magnum**
10.50 **Horton-sagaen**
11.40 **Horton-sagaen**
12.30 **I lyst og nød**
13.00 **Sjov og Spas**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Baywatch**
15.45 **Vild med dig**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens Nyheder på TV3**
17.20 **Sportsnyheder**
17.25 **Vejret**
17.30 **Sjov og spas**
18.00 **Sabrina – skolens heks**
18.30 **Ellen**
19.00 **Family Law**
19.55 **Heksene fra Warren Manor**
20.55 **Mareridt fra fortiden**
22.40 **Dagens Nyheder på TV3**
22.50 **Vore værste år**
23.20 **Ti tommelfingre**
23.50 **I lovens navn**
0.45 **I lyst og nød**
1.15 **Monty Pythons flyvende cirkus**
1.50 **Far er major**
2.20 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.50 **High 5**
3.20 **Godnat**

**BBC World**

0.00 **News – Weather**
0.30 **HardTalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Rough Guide to the World: »Alaska«** 1:4
2.00 **News – Weather**
2.30 **Reporters**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HardTalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **News – Weather**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **News – Weather**
7.30 **HardTalk**
8.00 **News – Weather**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **News – Weather**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **News – Weather**
10.30 **HardTalk**
11.00 **News – Weather**
11.30 **Rough Guide to the World: »Alaska«** 1:4
12.00 **News – Weather**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **News – Weather**
13.30 **HardTalk**
14.00 **News**
14.15 **World Business Report – Weather**
14.30 **Top Gear**
15.00 **News – Weather**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **News – Weather**
16.30 **Asia Today**
17.00 **News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **News – Weather**
19.30 **HardTalk**
20.00 **News – Weather**
20.30 **Click Online**
21.00 **News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **News – Weather**
22.30 **Panorama**
23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

0.00 **TLZ: »Wheeler on America«**
1.00 **TLZ: »Experimenter«**
1.20 **TLZ: »Experimenter«**
1.40 **TLZ: »Experimenter«**
2.00 **TLZ: »Evaluating Pre School«**
2.30 **TLZ: »The Founding of the Royal Society«**
3.00 **TLZ: »Flexible Work-Insecure Lives«**
3.30 **TLZ: »Images over India«**
4.00 **TLZ: »Hallo aus Berlin – Gesundheit«**
4.15 **TLZ: »Hallo aus Berlin – Ferien und Feste«**
4.30 **TLZ: »German Globo – Die Party«**
4.35 **TLZ: »Susanne«**
4.55 **TLZ: »German Globo – Die Ferien«**
5.00 **TLZ: »My Brilliant Career – Derek Hatton«**
5.30 **TLZ: »The Ozmo English Show«**
6.00 **Jackanory: »A Wizard of Earthsea«**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **The really Wild Show**
7.00 **Barmy Aunt Boomerang: »Daredevil Dad«**
7.15 **Barmy Aunt Boomerang**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Non-Identical Twins«**
8.20 **Change that: »Ragley Hall«**
8.45 **Kilroy: »My Father walked out«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Inspectors: »Swansea«**
10.30 **Great Antiques Hunt**
11.00 **TLZ: »Muzzy comes back«**
11.30 **Can't cook, won't cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Alexandra Palace«**
13.00 **Style Challenge: »Clown's Mum and Dad«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Can't cook, won't cook**
15.00 **Jackanory: »A Wizard of Earthsea«**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **The really Wild Show**
16.00 **Barmy Aunt Boomerang: »Daredevil Dad«**
16.15 **Barmy Aunt Boomerang**
16.30 **Top of the Pops Classic**
17.00 **Waiting for God**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Battersea Dogs Home**
19.00 **2 Point 4 Children: »One Night in Bangkok«**
19.30 **One Foot in the Grave: »Warm Champagne«**
20.00 **Casualty**
21.00 **Ruby Wax meets... »Dennis Rodman«**
21.30 **Top of the Pops Classic**
22.00 **The Beggar Bride**
23.15 **O Zone**
23.35 **Songs of Praise**

***SvF – Hósdagur kl. 21.40:***

## Soleiðis eru kvinnur 1:6 – Kroppur

»Klæðini skulu passa uppi á mær – og ikki umvent«, sigur Marie Frank, sum hevur slept tankanum um at líkjast einari superklænari poppstjørnu.

Viðmerkingin verður søgd í sendingini "Soleiðis eru kvinnur" sum í kvøld m.a. snýr seg um hvussu kvinnur hava tað við mati og motión.

Hetta er fyrsta sendingin av seks har kvinnur fara at siga frá um seg sjálva.



***TV3 - Hósdagin kl. 19.00:***

## Family Law

Amerikonsk sendirøð (Family Law)

Lynn verður blandað upp í eitt fløkt mál um tann islamiska Mulavi, sum skal sendst heim aftur, har ein hørð revsing er í væntu. Tað ger ikki málið lættari, at trúgv hansara forbjóðar konuni at vera í rættinum at verja hann. Danny og Rex fáa trupulleikar, tá teir verða á hvør sínum liði í einum máli um tvey dreingjalið í fótbólti, sum vilja hava rættin til at avgera úrslitið av einum finaludysti.



***TV3 - Hósdagin kl. 19.55:***

## Heksene fra Warren Manor

Amerikonsk sendirøð (Charmed)

Mostir at Halliwell systrunum, Gail, biðjur tær um hjálp við at finna eitt svar, tá fleiri lík verða funnin í býnum, har hon býr. Tað vísur seg seinni, at Gail bert hevur áhuga í at stjala heksamegina frá gentunum, so hon kann gera eina pagt við ein devul, sum kann tryggja henni ævinligt lív. Piper er tó als ikki kedd um at hava mist megi sína, tí hon gleðir seg nú til at liva eitt vanligt lív.

***TV3 - Hósdagin kl. 20.55:***

## Mareridt fra fortiden

Canadiskur spenningsfilmur frá 1995 (Remember Me)

Kelly McGilles (»Top Gun« og »Vidnet«) hevur høvuðsleiklutin í hesum spenningsfilmi. Menley Nichols var út fyri marruni hjá øllum mammum, tá sonur hennara doyði í einari tokvanlukku. Hon er sjálvsagt ógvuliga tyngd av tilburðinum, og gevur eisini sær sjálvum skuldina fyri hetta, og hetta hevur eisini gingið út yvir hjúnarlag hennara við verjuadvokatin, Adam. Tá tey bæði fáa dóttrina Hannah, vendir alt tó til tað betra, og alt er gott fram til løtuna, tá tey flyta inn í stóra, vakra og gamla Remember House. Í húsinum býr eitt ræðuligt loyndarmál, og skjótt fara duldu kreftirnar at spæla sítt spæl. Adam er bangin um konu sína, tí hann veit ikki, um hon er við at verða svøk. Menly veit ikki sjálv, hvat hon skal halda, tí hvat er tað, sum gongur fyri seg í gamla húsinum.







# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin a alnetinum:
www.sosialurin.fo

# FSF gevur KÍ loyvi at spæla á norðoyarstevnu

*FSF hevur brúkt altjóða grundgeving fyri at sekta KÍ við bót og ikki við at taka heimavøllin frá teimum, tí teir ikki hava vart dómarabólkin nóg væl. Avgerðin hevur við sær, at dómarafelagið nú leitar sær ráð aðrastaðni*

Klaksvíkingar mundu draga andan lættari týskvøldið. Tá var greitt, at tað verður landskappingardystur í Klaksvík á norðoyarstevnu. Kappingarnevndin hjá FSF gjørdi týskvøldið av, at KÍ skal sektast við einari bót upp á tíggju túsund krónur afturfyri, at ein áskoðari fekk høvi at smekka til annan linjuverjan, tá dómarabólkurin og spælararnir í hálvleikinum vóru á veg út av vøllinum, tá B68 var í Klaksvík dýra biðjudag.

Avgerðin hjá FSF verður søgd at vera grundað á, at aðra staðni er tað vanligt, at heimalið verða sektað við bót, tá tey ikki megna at halda tað trygdarstøði, sum tað verður kravt í ásetingunum.

Vit hava áður víst á, at fyri fimtan árum síðani og meiri enn tað er tað komið fyri meiri enn eina ferð, at eitt lið er dømt at missa heimavøllin, tí dómarabólkurin hevur verið álopin.

Nú hevur kappingarnevndin gjørt av at sekta við bót. Tað verður sagt, at aðra staðni er tað bara í heilt serstøkum førum, at heimavøllurin verður tikin frá einum felag, og í FSF tykjast teir ikki meta tað, sum gekk fyri seg í Klaksvík dýra biðjudag, at vera so serstakt.

Vit skilja á lagnum, at KÍ hevur tikið avgerðina hjá kappingarnevndini til eftirtektar.

Í kappingarnevndini hjá Fótbóltssambandinum eru Børge B. Hansen, formaður, Óli Holm, næstformaður, Jens Erik Magnussen, Karl Vidtfeldt og Sveinbjørn Danielsson.

### Altjóða samstarv

Hans Falkvard Hansen er formaður í dómarafelagnum. Hann hevði hoyrt um avgerðina hjá kappingarnevndini, tá vit høvdu samband við hann í gjár:

– Í hesum spurninginum er tað avgerandi fyri okkum sum felag, at limirnir hjá okkum hava ta trygd, sum er neyðug, tá teir døma, og tá teir ferðast til og frá dystum. Eg havi lagt til merkis, at FSF sigur, at teir í hesum førinum halda seg til tað, sum er vanligt uttanfyri Føroyar. Vit í dómarafelagnum fara at hava fund kristi himmalferðardag klokkan 18, har vit fara at viðgera avgerðina hjá FSF. Tá FSF nýtir altjóða praksis, halda vit, at tað er neyðugt hjá okkum at kunna okkum um altjóða dómarapraksis. Tí havi eg í dag verið í sambandi við dómarafelagið í Danmark og eisini við norsk dómaraumboð. Hetta havi eg gjørt fyri at frætta frá teimum, um teir kenna til mál, sum líkjast hesum, og hvussu tey eru takklaði, sigur Hans Falkvard Hansen.

Og hann leggur afturat:

– Vit hava sæð, hvussu sovorðin mál áður eru avgreidd í Føroyum, og tá teir í FSF nú broyta praksis, so mugu vit fáa at vita, hví hetta verður gjørt. Og so mugu vit meta um, um hetta fer at broyta trygdina hjá okkara fólki.

Í avgerðini hjá FSF verður víst til grein tjúgu í kappingarreglunum fyri fótbólt. Har verður sagt, at tað er liðið, sum spælir á heimavølli, ið hevur ábyrgdina av vælferðini hjá dómara og linjuverjum, og at heimaliðið eigur at ansa eftir, at eingin áskoðari órógvar ella sýnir óhøviskan atburð móti dómara og linjuverjum.

FSF undirstrikar, at um tað, ið fór fram, tá B68 var í Klaksvík, fer at endurtaka seg, so verður farið harðligari fram ímóti KÍ.

JH

# - Hatta er langt úti

*Oddmar Andreasen, sum dømdi dystin í Klaksvík, er bangin um trygdini hjá dómarum í framtíðini*

Jákup Mørk

- Hatta er langt úti. Soleiðis ljóðaði fyrsta viðmerkingin frá Oddmari Andreasen, sum var dómari í dystinum í Klaksvík, har annar av linjuverjunum varð sligin í hálvleikinum.

- Hann heldur, at ein bót upp á 10.000 kr. als ikki hevur nakran sum helst týdning í hesum sambandi. Til samanberingar nevnir hann, at tað eitt nú kostar einar 2-3.000. kr. at taka eitt piltalið úr kappingini.

### Steðgar fyribils

Spurdir um hvørt dómarabólkurin ætlar sær at taka nøkur stig í hesum sambandi, sigur Oddmar, at hann sjálvandi ætlar sær at biðja um ein fund við dómarafelagið sum skjótas, og at hann fram til nærri greiða er fingin á málinum, hevur biðið seg undan at døma nakran dyst..

- Tá FSF eftir mínum tykki ikki tekur málið í nóg stórum álvara, mugu vit vita, um vit í samráð við dómarafelagið kunnu gera nakað, tí hetta snýr seg um trygdina hjá dómarunum undir dysti, sigur Oddmar, og vísur samstundis á, at tað í fleiri dystum er komið fyri, at fløskur og annað verður tveitt eftir dómarunum, uttan at hetta fær nakrar sum helst avleiðingar fyri felagið.

Víðari sigur hann, at hann eisini ber ótta fyri, at hetta kann skapa split í dómarafelagið, um so er, at ikki allir dómarar eru samdir í málinunm, sum eftir hansara tykki er rættuliga prinsipielt.

– Hetta vildi sjálvandi verið ein óheppin støða, tí eitt brot í felagnum vildi sjálvandi viðført, at felagið í framtíðini stendur nógv veikari, men eg vil ikki á nakran hátt standa model til slíka viðgerð av málinum.

### Varð átalaður

At enda nevnir Oddmar, at hann fyri einum tveimum árum síðani var fyri liknandi tilburði í Gøtu. - Ta ferðina fekk eg eitt spark á skinnabeinið, og varð eisini skumpaður. Eftir dystin tosaðu fólk frá GÍ tó við meg, og eg fekk eisini eina umbering fyri atburðin hjá áskoðarunum, og hetta sissaði meg somikið nógv, at eg ikki sendi nakra frágreiðing til FSF.

Tá fekk eg eitt hvassliga orðað skriv frá FSF, tí eg ikki hevði givið frágreiðing um tilburðin, tí FSF var av teirri áskoðan, at hetta skuldi revsast, men er revsingin ikki meira enn tann, sum nú er givin KÍ, kann alt at kalla vera tað sama, sigur Oddmar Andreasen at enda.



*Meðan málið um revsingina hjá KÍ verður viðgjørt, hevur Oddmar Andreasen biðið seg undan at døma nakrar dystir*

***Mynd: Álvur Haraldsen***